# So hendi tað aftur: Tingið varð skeivt samansett

Jógvan Mørkøre



Valið, sum fór afturum, gav enn einaferð tingmannabýti, sum ikki var í samsvar við býtið í atkvøðum um landið. Tað hava vit sæð fyrr. Tað, sum var serligt hesuferð, var, at triði størsti flokkur í atkvøðum, gjørdist størstur á tingi. Tey, ið kendu seg at vera fyri vanbýti, søgdu við ein munn, at her var okkurt galið við valskipanini. Tað hava vit eisini hoyrt fyrr, men síðani er einki hent. So latið tað verða hesuferð. Broytið uppteljingarháttin og økið talið á eykamonnum, so vit fáa eitt veruligt lutfalsval.

### "Tað er okkurt galið við valskipanini".

Hesi vóru orðini hjá táverandi formanni Sambandsfloksins, Lisbeth Petersen, tá ið hon illa heitin, skuldi svara naskum spurningum frá fjølmiðlafólki, ið tevjaði blóð. Tað var lætt at skilja, at tey vóru skelkað rundanum sambandsborðið í Norðurlandahúsinum valkvøldið. Ikki bara høvdu veljararnir svikið sítt lyfti um at geva flokkinum ein munadyggan stuðul. Nú spældi valskipanin teimum eitt puss omaná. Tjóðveldisflokkurin, ið fekk 2 % minni enn Sambandsflokkurin, vann kortini eitt løgtingsumboð meira. Tað kendist sum vera man sum ein blóðugur órættur. Og ivaleyst kennist tað eisini sum ein smeitur, at enda við at fáa sama tingmannatal sum Fólkaflokkin, hóast hesin lá góð 3 % aftanfyri.

Ein avgjørdur formaður í Javnaðarflokkinum helt fyri hetta kvøld, at her var okkurt, ið átti at verið eftirhugt í seyminum, tá ið flokkur, ið endaði sum nummar trý í atkvøðum, kundi gerast størsti flokkur á tingi.

### Tey skeivu úrslitini

Vit hava fyrr sæð margháttlig úrslit, sum mugu sigast at vera skeiv. Tey eru ikki skeiv sambært verandi løgtingsvallóg, men tey eru skeiv, tá ið endamálið við at hava ta skipan, vit hava, er at tryggja lutfalsliga umboðan í Løgtinginum. Tað vil siga, at flokkarnir eiga at fáa eina umboðan á tingi, sum svarar til ta undirtøku, teir hava ímillum veljararnar. So nær sum gjørligt við tí avmarkaða tingmannatali, vit hava.

Við løgtingsvalið í 2002 var eisini galið. Tá fingu Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin sama tingmannatal, 8, hóast 2,3% á muni. Sambandsflokkurin var størstur við 26 %, men kortini varð hann ikki størstur á tingi. Og munurin niður til hinar báðar stóru, Fólkaflokkur og Javnaðarflokkur varð bert ein tinglimur, hóast tað var meira enn 5 % á muni. Av røttum skuldi hann havt ein meira enn Tjóðveldisflokkin og 2 á muni niður til hinar báðar.

Fara vit aftur til valið í ´98, so vóru tað Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, ið høvdu orsøk til at grísla tenn, men Fólkaflokkurin kundi fegnast. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin fingu 8 tinglimir í part, hóast Tjóðveldisflokkurin var hálvt triðja prosent størri. Tjóðveldisflokkurin fekk undirtøku frá 23,8 % av veljarunum, meðan Fólkaflokkurin fekk 21,3 %. Svárast mundi tað kennast hjá Javnaðarflokkinum, sum við sínum 21,9 % fekk 2 tinglimir færri enn Fólkaflokkin. Hóast hann hevði meira enn hálvt prosent á muni niður til hansara!

Valið í ´94 var sermerkt við at Javnaðarflokkurin gjørdist tann stóri vinnarin við 10 løgtingsumboðum. Skuldi hann fingið umboðan í mun til atkvøðutalið, átti hann ikki at fingið fleiri enn 8. Tað, sum setti skeivleikarnar uppaftur meira í perspektiv, var, at hann var sera stutt frá at fáa 3 valdømisvald í Suðurstreymoy og harvið 11 tilsamans fyri landið sum heild. Tey serligu viðurskiftini, sum valdaðu í hesum valdømi, tá ið Helena Dam á Neystabø stillaði upp fyri Sjálvstýrisflokkin, gjørdu munin.

Soleiðis hevði borið til at farið ígjøgnum valini val fyri val aftur til 1978, tá ið vallógin varð broytt, so vit fingu 27 valdømisvald og upp í 5 eykavald. Tikið undir einum er tað skeivleikarnir, sum eyðkenna.



### Hvat er galið?

Tá ið vallógin varð endurskoðað í 1978, varð talið á møguligum eykavaldum minkað úr 10 niður í 5. Samstundis vórðu valdømisvaldu øðrvísi býtt millum valdømini, og samlaða talið varð økt úr 20 upp í 27. Talan varð um eina tillaging til broyttu fólkasamansetingina í valdømunum. T.d. fekk Suðurstreymoy 8 við lógarbroytingini í mun til 4, sum valdømið hevði havt í eitt mannaminni. Í uppskotinum, sum varð lagt fyri løgtingið, varð skotið upp, at Sandoyar valdømi skuldi bert hava ein valdømisvaldan, men tað varð broytt í tinginum, so samlaða talið gjørdist 32 í staðin fyri 31 sum í uppskotinum.

Samanumtikið var valreformin eingin ábót. Gamaní fekst eitt rættvísari býti millum valdømini, men at minka talið av eykavaldum úr 10 niður í 5, samstundis sum hildið varð fast við gamla uppgerðarháttin, eisini nevnt d'Hondt-hátturin, var eitt mistak. Tað hava eftirfylgjandi valini prógvað til fulnar.

Aðrastaðni, har roynt verður at hava lutfalsval til tjóðarting, er Sainte-Lague-hátturin komin í staðin fyri d'Hondt. Munurin liggur í, at við d'Hondt-háttinum, sum vit enn brúka, býta vit í valdøminum atkvøðutalið hjá einstøku flokkunum við 1,2,3,4 osfr. Sainte-Lague-hátturin - ella staktalsháttурin - brúkar staktøl, 1,3,5 osfr. at býta við. Tá ið valdømisvaldu tinglimirnir skulu finnast í valdøminum, fær tann flokkur, ið hevur flestar atkvøður fyrst valda tinglimin. Síðani verður atkvøðutalið býtt við 2 í d'Hondt og við 3 í Sainte-Lague-háttinum, og hugt verður eftir, um talið framvegis er størri enn tey óbýttu hjá kappingarneytunum. Er tað tað, fær flokkurin eisini næst valda, og síðani verður atkvøðutalið býtt við 3 í d'Hondt-skipanini og við 5 í Sainte-Lague. Stórir flokkar fáa soleiðis meira burtur úr d'Hondt-skipanini, samstundis sum hon krevur, at eitt størri tal av eykavaldum tinglimum má til fyri at javna teir mismunir, ið uppstanda, og til tess at tryggja, at talan er um lutfalsval í landinum sum heild.

Okkara valskipan er óheppin, tí at vit hava framvegis d'Hondt-háttin at býta valdømisvaldu við, samstundis sum vit hava eitt ov lítið tal av eykavaldum til at javna teir mismunir, ið verða fyri landið sum heild.

Við feska valúrslitinum sum dømi, so hevði tað kravt 9 eykavald, men vallógin hevur ta avmarking, at tað kunnu í mesta lagi verða vald 5. Tískil fáa vit ikki rætt lutfall millum flokkarnar í tingumboðanini samanborið við sjálvt valúrslitið í prosentum.

### Lutfalsval eitt eiti

Valskipan sum tann, vit hava, er valskipan, sum fyrst og fremst skal tryggja lutfalsliga umboðan, so flokkarnir, ið fáa valt uppstillaðar limir á ting, fáa eina umboðan, ið svarar til undirtøkuna millum veljararnar. Føroyskt heiti er lutfalsval. Aðrastaðni verða heiti sum proportionalval brúkt.

Endamálið er at tryggja rættvísa umboðan. Men royndirnar vísa okkum, at tað er so ikki tað, vit fremja við verandi valskipan.

At tað er neyðugt at gera nakað við henda spurning, vísir ikki bert seinasta val, men stórt sæð øll valini síðani 1978. Og fyri alt tað kunnu vit enda í tí, sum er nógv verri, vil illa til.

### Fáið nú broytt lógina

Hvørja ferð hesir skeivleikar koma fyri, verður havt á lofti, at nú átti lógin at verið broytt, men tað verður mest til graml, tí síðani fer tað aftur við borðinum og onnur mál taka yvir. Til næstu ferð val hevur verið. Verður tosað um vallógina, so er tað spurningurin, um Føroyar skulu vera eitt valdømi, sum upptekur fólk. Tað er so annar og nógv størri spurningur, sum krevur eitt orðaskifti fyri seg.

Tað, sum tað krevur av broytingum, so tað slepst undan teimum ringastu skeivleikunum, er ikki tað stóra. Í grundini bert nakrar smærri broytingar í orðingunum í tveimum greinum í vallógini. Onnur viðvíkur uppgerðarháttinum, hin talinum á eykavaldum.

At taka loftið fyri eykavald burtur ber ikki til. Men tað ber til at fremja ábøtur, so tað slepst undan teimum mest meiningsleysu sveiggjunum. Stýrisskipanarlógin loyvir upp í 33 tinglimum. Og letur tað so yvir til løgtingið at skipa fyri rest við løgtingsvallóg. So har er t.d. møguleiki at økja talið av eykavaldum úr 5 upp í 6. Samstundis hevði tað bøtt um tað óhepna við at hava eitt ting, har samlaða talið er eitt líka tal. Tað krevur tó, at talið á eykavaldum verður fast eins og í øðrum londum rundanum okkum, har tey eisini hava lutfalsvalskipanir.

Mest umráðandi er tað tó, at farið verið frá d'Hondt-háttinum til Sainte-Lague.

Úrslit frá valinum við verandi skipan og við uppskotnu skipan.

| | Løgtingsval 2004 D'Hondt og 5 eykavald | | | | Løgtingsval 2004 Sainte-Laguës og 6 eykavald | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. |
| A. Fólkaflokkurin | 20,6 | 5 | 2 | 7 | 20,6 | 5 | 2 | 7 |
| B. Sambandsflokkurin | 23,7 | 7 | 0 | 7 | 23,7 | 8 | - | 8 |
| C. Javnaðarflokkurin | 21,8 | 7 | 0 | 7 | 21,8 | 6 | 1 | 7 |
| D. Sjálvstýrisflokkurin | 4,6 | 0 | 1 | 1 | 4,6 | 0 | 2 | 2 |
| E. Tjóðveldisflokkurin | 21,7 | 8 | 0 | 8 | 21,7 | 7 | - | 7 |
| H. Miðflokkurin | 5,2 | 0 | 2 | 2 | 5,2 | 1 | 1 | 2 |
| K. Hin Stuttligi Flokkurin | 2,3 | 0 | 0 | 0 | 2,3 | 0 | - | 0 |
| | 100,0 | 27 | 5 | 32 | 100,0 | 27 | 6 | 33 |



### Hvat hevði hent?

Royna vit henda leist upp á tað valúrslit, vit júst hava fingið, so síggja vit, hvussu uppskotna skipanin virkar í mun til verandi. Tjóðveldisflokkurin hevði fingið ein minni, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin ein meira. At Sjálvstýrisflokkurin fær ein meira, skyldast at talið á eykavaldum økist. Annars hevði hann ikki fingið tað.

Munurin sæst eisini í teimum einstøku valdømunum. Í teimum smáu við bert tveimum valdømisvaldum, Norð Streymoyaroya, Vága og Sandoyar valdømi, hevði úrslitið verið tað sama. Somuleiðis í Eysturoy. Men í Norðoyggjum, Suðurstreymoy og Suðuroy hevði tað follið øðrvísi.

Í Norðoyggjum hevði Fólkaflokkurin bert fingið ein í mun til tveir sum nú. Í staðin hevði Sambandsflokkurin sloppið upp í part við einum.

Í Suðurstreymoy hevði Tjóðveldisflokkurin ikki fingið 3, men bert 2. Áttandi valdi hevði farið til Miðflokkin við hesum uppgerðarhátti og ikki til Fólkaflokkin, sum onkur kanska hevði væntað.

Í Suðuroy høvdu teir fýra stóru flokkarnir fingið hvør sín av teimum 4 val-dømisvaldu. Tað vil siga, at Javnaðarflokkurin hevði ikki fingið 2 sum nú, men bert 1, meðan Fólkaflokkurin umsíðir hevði vunnið sær umboðan aftur.

Skurðurin hevði ikki verið hin sami hjá stóru flokkunum í teimum valdømum, har teir dominera í dag, men fyri landið sum heild hevði fingist eitt býti, sum er meira rættvíst.